

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 12 - 2011

# Metstórt virksemi á norska landgrunninum í 2012

Ongantíð áður hevur íløguhugurin verið so stórur á norska landgrunninum sum nú og fer hann komandi ár at seta met. Hagtøl vísa, at oljufeløgini fara at brúka 185 milliardir krónur á norska landgrunninumm í 2012. Fyri 2011 eru mettu tølini góðar 150 milliiardir. Við teimum heldur døpru altjóða útlitunum, kunnu vit bert fegnast um bjørtu útlitini fyri norska búskapin sigur Bjørn Harald Martinsen, fakligur stjóri hjá OLF, sum er áhugafelagið hjá oljufeløgunum og norska oljuídnaðinum. Stóri vøksturin í íløgunum í oljuvirksemi stavar frá verandi framleiðslu og heilt nýggjum útbyggingum. Stórar útbyggingar eru á feltum sum Goliat, Gudrun, Ekofisk, Brynhild og Alta. Hyggja vit longur fram, so fara vit at síggja meira til heimsins størsta fund í ár, Avaldsnes/Aldous, sum vórðu gjørd fyrr í ár. Hesar mongu útbyggingar komandi árini fara at hava við sær bygging av fleiri nýggjum oljupallum . Føroysk arbeiðsmegi Alt hetta nógva virksemi fer at hava við sær, at norska olju- og frálandavinnan fer at hava brúk fyri útlendskari arbeiðsmegi. Henda gongdin fer at koma í hæddina í 2014 og eftir tað. Nógvir føroyingar hava verið við til arbeiðis í norsku oljuvinnuni seinastu árini. Eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er tó skiftandi, alt eftir hvussu nógvar verður bygt. Eitt nú eru risastóru byggingarnar av tveimum gassverkætlanum, Snøvit og Ormen Lange, so gott sum lidnar. Eingin ivi er tó um, at tað eisini komandi árini fara at verða boð eftir føroyskum handverkarum. Ì dag hava vit tvær fyritøkur í Føroyum, sum leiga út føroyskar handverkarar til norsku oljuvinnuna. Tey eru Pam Offshore og Faroe Offshore.